Nr.: 2009-0871/42
Ø: BYGM

# Serstøk byggisamtykt fyri økið innanfyri Tinghúsvegin, Sverrisgøtu, Niels Finsensgøtu og Bøkjarabrekku.

Við heimild í § 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum, verður ásett:

## § 1. ØKIÐ SAMTYKTARINNAR

Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfestu fylgjuskjølum og er galdandi fyri matr. nr. 384a, 385, 386, 387, 413c, 413d, 414e, 414b, 419, Tórshavn.

Umframt nevndu matr. nr. er økið við frámerkingini (A) álagt treytinum í serstøku byggisamtyktini fyri øki.

## § 2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Økið liggur í 1. Grundumráði sambært Almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

*Stk. 1.* Endamáli við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bygging, nýtslu, parkering v.m. fyri avmarkaða øki, Tinghúsvegin, Sverrisgøtu, Niels Finsensgøtu og Bøkjarabrekku, so at umráðið og bygningarnir verður við til at styrkja og stimbra miðbýarøki í framtíðarhøpi.

*Stk. 2.* Sambært grein 6 í ásetingunum fyri økið í 1. Grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er í eini serstakari byggisamtykt loyvt at víkja frá ásetingunum í grein *2: Byggistig, 3: Nettonýtslustig, 4: Húsahædd, 5: Veglinja / byggilinja.* Henda serstaka byggisamtykt er ein tílík serætlan fyri eitt avmarkað øki.

*Stk. 3.* Grundumráðið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhølir og tílíkt.

| INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 1830 - 033/10 |
| Góðkent: | 26/5 - 2010 |
| Dagfesting: | 26/5 - 2010 |
| Váttað: | [signature] |

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

*Stk. 1.* Nýtslan av økinum er óbroytt, í mun til ásetingina fyri 1. Grundumráði í "Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu"

*Stk. 2.* Tá byggiloyvi skal latast innan økið hjá hesi serstøku byggisamtykt, skal byggivaldið meta um, hvørt nýtslan og tær funktiónir, ið nevndar eru, eru býttar á hóskandi hátt í økinum. Fyri at tryggja eitt hóskandi býti, kann byggivaldið tí seta sum treyt fyri byggiloyvinum, at ávís nýtsla ella funktión eftir ítøkiligari meting skal verða, ella at ávís nýtsla ella funktión ikki kann verða.

## § 4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SNIÐ HÚSANNA

Tað kann bert byggjast innan fyri byggifeltini, og skal øll bygging byrja frá markinum ið avmyndar økið ið serstaka byggisamtyktin lýsir, og inneftir.

*Stk. 1.* Ikki er loyvt at byggja inn um ásettu økisfrámerkingar fyri hvørt øki sær, til nakrar síðu.

*Stk. 2.* Mest loyvda bygging, nettonýtslan, er ásett fyri hvørt byggifelt sær í viðfestum skjølum. Tó má ábyggingin ikki fara upp um 3,0 fyri økið sum heild.

*Stk. 3.* Hús mugu ikki verða bygd hægri enn ásett er í fylgiskjali 1, fyri hvørt einstakt byggifelt. Hægst loyvda byggihædd er ásett við kotum eftir markalinjuni, ið avmarkar økið ið byggisamtyktin fevnir um. Eingin partur av húsinum, yvirgrind ella møn o.s.f.v mugu koma upp um stiplaðu linjuna. Undantaksloyvi kann tó verða givið fyri elevatorhúsum, ventilatiónshúsum ella øðrum lágum, løttum og smærri bygningum, ið fella natúrligt inn í skapi á húsinum og sum byggimynduleikin metir ikki sjónligt økir um húsahæddina.

*Stk. 4.* Kjallarahædd kann í ávísum økjum byggjast í samráð við byggivaldið.

*Stk. 5.* Kjallarahæddin, har loftið er 1 m. yvir veghædd, verður tald við í nettonýtslustignum.

*Stk. 6.* Byggingin skal haldast innan fyri ásettu treyturnar í hvørjum einstøkum byggifelti.

*Stk. 7.* Hús skulu vanliga vera samanbygd við framsíðu í veglinjuna ella í byggilinjuna, har ein tílík er.

## § 5. ÚTSTYKKINGAR / SUNDURBÝTI / SAMANLEGGINGAR

Útstykking, sundurbýti og samanlegging, verður einans loyvt, um tað hóskar við byggiskipan, sum byggivaldið hevur gjørt fyri alt grundumráði og tað sum verður sundurbýtt líkar krøvini í hesi serstøku byggisamtykt.

## § 6. PARKERING

Í samband við parkeringsviðurskifti, ið kunnu tæna økinum í og rundanum Tinghúsvegin, Sverrisgøtu, Niels Finsensgøtu og Bøkjarabrekku, tilskilar Tórshavnar kommuna sær rættin, at taka støðu til parkeringsviðurskiftini í hvørjari einstakari byggimálsviðgerð.

## § 7. Ferðsla

Í samband við ferðsluviðurskifti, ið kunnu tæna økinum í og rundanum Tinghúsvegin, Sverrisgøtu, Niels Finsensgøtu og Bøkjarabrekku, tilskilar Tórshavnar kommuna sær rættin, at gera tillagingar í bygningsskapi staðseting o.s.f.v í hvørjari einstakari byggimálsviðgerð.

## § 8. ÚTSJÓND HÚSANNA

*Stk. 1.* Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggivaldið.

*Stk. 2.* Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## § 9. AÐRAR ÁSETINGAR

Fyri allari bygging er annars galdandi reglurnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu uttan ásetingarnar í
*"KAP. IV BYGGINGARFYRISKIPANDI ÁSETINGAR / § 2. Ásetingar fyri 1.Grundumráði / Stk. 3, 4, 5, 6"*

## § 10. Verandi bygningar

Hendan byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi løglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við løgligari nýtslu av eini ogn. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um ella taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

## § 11. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 12. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

*Stk. 1.* Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

*Stk. 2.* Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

Fylgiskjal 1




Kunning:

Stiplaða linjan á uppstaltunum (fylgiskjøl 2,3,4,5) er bert vegleiðandi, Hæddar koturnar, í metrum, á fylgiskjali 1 eru galdandi fyri hægst loyvdu byggihædd.

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | = | 30,668 | 14 | = | 23,947 |
| 2 | = | 30,373 | 15 | = | 23,947 |
| 3 | = | 29,411 | 16 | = | 24,377 |
| 4 | = | 27,759 | 17 | = | 24,377 |
| 5 | = | 27,116 | 18 | = | 24,416 |
| 6 | = | 25,335 | 19 | = | 25,332 |
| 7 | = | 24,062 | 20 | = | 25,324 |
| 8 | = | 24,062 | 21 | = | 25,324 |
| 9 | = | 23,962 | 22 | = | 25,392 |
| 10 | = | 23,962 | 23 | = | 25,594 |
| 11 | = | 23,947 | 24 | = | 28,459 |
| 12 | = | 23,947 | 25 | = | 29,413 |
| 13 | = | 23,947 | | | |

Marknaðarlinja (ytri kantur ímóti høvuðsvegi, á hvørjum einstakum matrikuli á økinum)

Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri.

Fylgiskjal 2



Fylgiskjal 3




UPPSTALTUR SUÐUR MÁT 1:200

Fylgiskjal 4




UPPSTALTUR EYSTUR MÁT 1:200

Fylgiskjal 5



Fylgiskjal 6

| Serstøk byggisamtykt fyri økið Tinghúsvegur, Sverrisgøta, Niels Finsensgøta og Bøkjarabrekka. | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |
| Matr. nr. | Grundøki m² | Verandi nettonýtslustig | Komandi nettonýtslustig |
| 387 | 249 m² | 0,5 | 2 |
| 386 | 318 m²<br>(1. hædd = kjallara) | 2,01 | 2,01 |
| 385 | 427 m² | 3,33 | 3,33 |
| 384a, 413c, 413d | 638 m², 31 m², 488 m² =1157 m² | 1,83 | 2 |
| 414e, 414b, 419 | 239 m², 245 m², 382 m² = 866 m² | 1,96 | 2,5 |
| Samanlagt | Íalt: 3.017 m² | 1,926 | 2,33 |

Fylgiskjal 7




Verandi ábygging, ikki mátføst. (kelda: Tórshavnar kommuna )

Mál: 2009-0871/42
Ós: BYGM

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Móttikið

30 AUG 2010

Journal

Tórshavnar kommuna
Postbox 32
110 Tórshavn

26. august 2010
Mál: 1830-033/10-8
Tygara skriv:
Viðgjørt: KHP

**Viðvíkjandi broyting í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og serstøk byggisamtykt fyri økið millum Tinghúsvegin, Sverrisgøtu, Niels Finsensgøtu og Bøkjarabrekku**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1957 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 25. mai 2009, hevur Tórshavnar kommuna sent Innlendismálaráðnum uppskot til broytingar í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og serstøk byggisamtykt fyri økið millum Tinghúsvegin, Sverrisgøtu, Niels Finsensgøtu og Bøkjarabrekku til góðkenningar.

Viðmerkjast skal, at Innlendismálaráðið tekur undir við viðmerkingunum frá Býarskipanarnevndini, og vísandi til omanfyri standandi verður sagt frá, at Innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir, at byggisamtyktin verður broytt, víst verður til ætlanarskrivið dagfest 24. august 2010.

Hjálagt er rættaður byggisamtyktartekstur fyri Tórshavnar kommunu við átekning frá Innlendismálaráðnum.

Vegna Innlendismálaráðið

Elsa Østergaard
ráðgevi

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 306800 · faks 306885 · imr@imr.fo · www.imr.fo